# Semja um sjeyndu stevnuna

**Men áheitanin úr Fuglafirði og Runavík um at hava FM stevnur í hesum plássum á hvørjum ári varð ikki samtykt, m. a. tí vágamenn høvdu ynski um størri lut í FM kappingunum**

FM KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*



*Fuglfirðingar skutu upp á aðalfundinum hjá róðrarsambandinum, at FM-róður skal vera á Varmakeldustevnu í Fuglafirði á hvørjum ári. Hetta uppskotið varð tó ikki samtykt. Enn hevur RSF ikki gjørt av, hvar sjeyndi FM-róðurin skal vera. Her verður Havnarbáturin drigin upp á stevnuni í fjør*

Kappróðrarárið í ár verður, sum undanfarnu árini hava verið. Tað vil siga, at tað fer at verða kappast um FM stig í seks róðrum.

Á aðalfundinum hjá Róðrarsambandinum leygardagin vóru uppskot frá Róðrarfelagnum NSÍ og frá fuglfirðingum um, at stevnurnar í Runavík og í Fuglafirði skuldu telja við í FM kappingini í kappróðri á hvørjum ári. Undanfarin ár hevur róðurin í nevndu plássunum verið FM róður aðru hvørja ferð, meðan tað hini árini hevur verið róð kapp, men kortini uttan at FM stig hava staðið upp á spæl.

Aðalfundurin hjá RSF tók undir við, at kappingin verður víðkað úr seks og upp í sjey FM róðrar. Men tað var ikki semja um, at sjeyndi FM róðurin skuldi verða í Eysturoy.

Sandavágs Ítróttarfelag hevði lagt uppskot fyri aðalfundin um, at avgerðin um at víðka róðrarárið til at fevna um sjey FM kappingar skuldi koma Vágunum til góða. Higartil hevur tað verið soleiðis, at FM róður hevur verið í Vágum í trý ár, og so hevur verið kappast í Vestmanna eina ferð. Uppskotið úr Sandavági gekk út uppá, at tey trý plássini í Vágum skiftast um at hava FM kappróður, og at Vestmanna møguliga verður knýtt afturat Kollafirði, soleiðis at hesi bæði plássini skiftast um at skipa fyri FM kapping í róðri.

## Beint í nevnd

Hannis Joensen, formaður í RSF sigur, at júst hetta málið fekk drúgva viðgerð á aðalfundinum. Sjónarmiðini vórðu vend og snarað, og nevndin í RSF kom til ta niðurstøðu, at spurningurin var ikki búgvin at taka støðu til.

– Tí skutu vit upp, at ein nevnd varð sett við umboðum úr teimum sjey økjunum at taka sær av at koma við uppskoti um, hvussu spurningurin skuldi loysast. Tað var semja um at seta nevndina, men tá nevndin skuldi mannast, fekst tað ikki semja um, hvør skuldi í nevndina. Tí var endin tann, at tað varð álagt nevndini í RSF at arbeiða víðari við spurninginum og at leggja eitt tilmæli fyri ein nýggjan fund at taka støðu til. Málið hevur nógvar síður, og tí er tað greitt, at talan verður ikki um sjey FM róðrar fyrrenn í fyrsta lagi 2003, sigur formaðurin í RSF.

Hvart eru tað fyri viðurskifti, sum skulu lýsast og greinast?

– Tað er ikki so einfalt sum bara at taka støðu til, hvar sjeynda stevnan skal vera. Við hesi avgerðini verður kappingarárið hjá kappróðrinum meiri trongt. Vit hava havt møguleikar at útseta, um veðrið ikki er til vildar, men tann møguleikin minkar, tá vit skulu kappast eitt vikuskiftið afturat. Tí mugu vit skerpa reglurnar t. d. soleiðis, at um tað ikki verða líkindi at rógva í einum staði ein ávísan dag, so skal bera til at flyta róðurin til eitt annað øki í grannalagnum, um líkindini eru betri í hesum økinum. Vit fara gjølla um broytingarnar í ásetingunum. Tað er týdningarmikið, at nevndin í RSF og feløgini tosa saman, og at allir partar verða vitandi um broytingarnar og góðtaka tær og verða sinnaðir at fylgja teimum. Men hetta tekur tíð, vísir formaðurin í RSF á.

# Nú fáa børnini høvi at luttaka í kappróðri

**Men møguleikarnir eru ikki so góðir hjá øllum, tí nógvir bátar eru seinnu árini farnir av landinum fyri lítið og lætt**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

Nú ætla kappróðrarfólkini at fáa fatur í teimum yngstu, tá ið tað eru yngri, enn tey hava verið higartil. Í kappingarreglunum verður í grein tíggju tosað um kappróður millum tey, sum eru niður í fjúrtan ára gomul. Nú er hetta broytt.

– Vit hava skoytt uppí ásetingarnar, at tað kann skipast fyri kappróðri fyri børn niður til tíggju ár. Vit hava leingi hildið, at hetta hetta fór at vera eitt gott tiltak, soleiðis at børnini fyrri kundu fáa roynt, hvussu tað er at rógva kapp, og nú hevur aðalfundurin samtykt, at tað skal farast undir hetta.

Hetta sigur Hannis Joensen, formaður í Róðrarsambandinum.

Ítøkiliga ætlanin hjá RSF er, at feløgini, sum skipa fyri FM stevnunum, skulu bjóða børnunum til kappróður á sama hátt, sum tey plaga at bjóða old boys og old girls.

– Vit ætla ikki at skipa fyri FM kapping, har tað verður lagt upp til, at manningarnar skulu ferðast kring landið fyri at vinna stig. Í staðin verður talan um kappingar, sum verða leysar hvør av aðrari. Luttakararnir, sum standa seg væl, skulu fáa heiðursmerkir soleiðis, sum tey vaksnu fáa tað, og so er tann kappingin av. Um luttakararnir vilja vera við í næstu kappingini, so er tað upp til teirra. Tey missa einki, um tey ikki taka lut, sigur Hannis Joensen.

## Sakna bátarnar

Í dag er flaggdagur. Tá plaga tey í fleiri feløgum at flota bátarnar. Tá vit spyrja Hannis Joensen, um hann roknar við, at talan fer at verða um stórar kappingar millum tey yngstu í ár, so er hann eitt sindur ivasamur:

– Tey seinnu árini eru nógvir nýggir kappróðrarbátar smíðaðir. Ikki minst 5–mannafør. Tí áttu nógvir bátar at verið tøkir, sum tey meiri tilkomnu, ið kappast um FM, ikki hava brúk fyri. Men soleiðis er veruleikin ikki. Nógvir bátar eru farnir av landinum til feløg og áhugabólkar, sum ikki hava rindað nakað serligt fyri teir. Orsøkin hevur verið, at feløgini ikki hava dugað at sæð, at tey aftur fóru at fáa brúk fyri bátunum. Tí kann hetta gerast ein praktiskur trupulleiki hjá nógvum, sigur Hannis Joensen.

Hann vísir eisini á, at teir í RSF mugu gera reglugerðir og vegleiðingar fyri sovornar kappingar, áðrenn tað verður farið undir tær, og hann sigur, at teir í nevndini arbeiða við hesum:

– Sovornar kappingar mugu fara fram undir eftirliti. Tað kann gott vera, at tað verður neyðugt, at onkur vaksin verður í bátinum undir venjing og kapping. Men hetta mugu vit fáa upp á pláss sum skjótast. Øll róðrarfólk eru áhugað í, at trygdin verður so stór, sum tað á nakran hátt ber til, sigur formaðurin í Róðrarsambandinum.

Eru manningar til sovornar kappingar?

– Í fleiri feløgum er tað. Í øðrum feløgum hava tey spurt seg fyri, um tað fer at bera til at taka lut við blandaðum manningum, tað vil siga bæði dreingjum og gentum. Tað duga vit ikki at síggja nakrar trupulleikar í, men vit arbeiða við tí.

## Stevnurnar

Fyrsta FM kappingin í kappróðri í ár verður – sum vanligt – á norðoyarstevnu. Hon verður leygardagin 1. juni. Næsti FM róðurin verður á Skálafjarðarstevnu, sum verður í Runavík 15. juni. So verður kappast á Sundalagsstevnuni, sum verður í Hósvík 22. juni og á jóansøku, sum verður í Vági 29. juni.

Vestanstevnan verður í Miðvági 13. juli, og finalan verður ólavsøkuaftan sunnudagin 28. juli.

Varmakeldustevnan í Fuglafirði telur ikki við í ár. Hon verður leygardagin 6. juli, og tað verður ivaleyst róð kapp.

**Bilar**

Nr. 78 • hósdagur • 25. apríl 2002 • 76. árg.



*Instrumentini minna ikki sørt um teir gomlu Citroën GS og CX , men nú í nútímans stíli*

# Citroën C3 – designaður við 2CV sum fyrimynd



*Citroën C3 er ein bilur sum skilir seg út millum bilar á gøtuni. Hann er designaður við Citroën 2CV sum fyrimynd*



*C3 verður einans marknaðarførdur sum hatchback við 5 hurðum*

**Upprunaliga høvdu designararnir góða gamla Citroën 2CV í huga, tá teir fóru undir at tekna Ciroën C3. Hóast teir ikki líkjast so nógv, er í báðum førum talan um bilar ið skilja seg út úr mongdini av bilum á gøtuni**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Citroën C3 er ein bilur sum verður lagdur til merkis í gøtumyndini. Hann hevur ótradionelt design og ongin ivi er um at talan er um ein Citroën. Bilurin er bygdur yvir ein heilt nýggjan plattform, og er í stødd ímillum Citroën Saxo og Xsara. C3 verður einans marknaðarførdur sum hatchback við 5 hurðum.

## Gott útsýni

C3 er lættur at koma inn í og man situr høgt, sum í einum MPV, við góðum útsýni. Instrumentini í instrumentborðinum minna ikki sørt um teir gomlu Citroën GS og CX. Alt inni í bilinum er lætt at umgangast, eins og fleiri góðar praktiskar loysnir eru at finna, so sum skuffur undir setrunum, dupult handskarúm og flúgvaraborð til tey ferðani á baksetrinum. Viðførisrúmið er 305 litrar, sum má sigast at vera stórt í hesum klassanum.

## Orkusparandi diesel

Í fyrsta umfari verða fýra motorstøddir at velja ímillum. Bensinmotorarnir eru hesir: 1.1 litur við 61 hk, 1.4 litur við 75 hk og ein 1.6 litur við 109 hk. Diesel motorurin er ein 1.4 litur HDI við 70 hk, sum orkar væl, larmar lítið og er sera orkusparandi, við tað at hann koyrir 23,8 km/l við blandaðari koyring. Seinni kemur ein HDi við 93 hk.

## Servo til býkoyring

C3 er lættur at koyra. Servostýringin er soleiðis, at hon er løtt til býkoyring og verður tyngri sum ferðin økist. Koyrieginleikarnir eru heilt í topp, sum í flestu fronsku bilum. Eisini er nógv av trygdarútgerð, sum t.d. bremsuassistentur, ið optimerar bremsutrýstið, elektroniskur bremsukraftdeilari, fýra airbag og gardinairbag. Uttan iva verður C3 ein væl umtóktur bilur her hjá okkum.

### Citroën C 3 1,6 16V bensin

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1.6 litur 4 syl. bensin 110 hk |
| O-100 km/t | 10.7 sek. |
| Oljunýtsla | 15.4 km/l |
| Dekkstødd | 165/70-14 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 385,0 cm |
| Breidd | 167,0 cm |
| Hædd | 152,0 cm |
| Eginvekt | 1025 kg |
| Viðførisrúm | 305 litrar |
| Prísur | kr. 154.000,- |
| Søluumboð | Ivan Johansen Bilar<br>Hoyvíksvegur 63<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 313666<br>www.ivan.fo |